# Føroya Blaðmanna-felag skift navn



Blaðmannafelagið skifti á aðalfundi leygardagin at skifta navn til Føroysk Miðlafólk. Á fundinum varð nevndin afturvald. Forkvinna í felagnum er Anna V. Ellingsgaard, blaðkvinna á Sosialinum. Álvur Haraldssen, myndamaður á Sosialinum er næstformaður, og Ingolf S. Olsen, journalistur í Kringvarpinum er triði nevndarlimir. Sum tiltakslimir varð Sigrun Brend, samskiftisfólk í Eik, afturvald, meðan Jón Brian Hvidtfelt, útvarpsmaður á Rás2 var nývaldur. Umframt at skifta navn, viðtók felagið eisini, at miðlafólk, sum starvast sum stjórar ella hava lønar- ella setanarmyndugleika mótvegis limum í felangum, Føroysk Miðlafólk, ikki kunnu vera limir í felagnum.

# Fosturtøka á skránna 8. mars

Á altjóða kvinnudegnum skipar Samskipan Føroya og Kvinnufelagið í Havn fyri tiltaki í Norðurlandahúsinum. Millum annað verður orðaskifti um fosturtøku á skránni, har evnið verður lýst frá ymiskum sjónarhornum, bæði fakligum og hugsjónarligum, eitt nú tí juridiska, læknafrøðiliga, kristiliga, tí samfelagsliga og persónliga sjónarmiðnum. Elin Winther Poulsen, tíðindakvinna í Rás2 verður fundarstjóri. Um kvøldi, klokkan 19.30, byrjar sjónleikurin Ibsens kvinnur við tí norsku sjónleikarkvinnuni Juni Dahr.

# Nakin kvinnna og rullandi politbilur

**Tá politiði um vikuskifti skuldi avheintað avdotnan mann í Klubbagarðinum í Havn, sníkti ein fullur maður seg inn í politibilin, koyrdi hondbremsuna niður og koyrdi bilin á rull**

LØGREGLAN
*Dorit Hansen*
*dorit@sosialurin.fo*

21 ára gamli maðurin, sum stuttleikaði sær við at koyra politibilin á rull, verður nú ákærdur eftir grein 252 í revsilógini, sum kann geva upp til 4 ára fongsul, fyri í ósketni ella ovfarakæti at seta lív ella førleika hjá øðrum í vanda.

Ein av teim eitt sindur minni vanligu uppgávunum hjá politinum hetta vikuskifti var, tá ein ung kvinna fór á vertshús uttan klæðir. Vakthavandi á politistøðini sigur, at vertshúsið fráboðað politinum, og kvinnan varð fyrst senda á skaðastovu og síðani koyrd í taxa heim. Hon býr á bygd.

- Kvinnan hevði bæði drukkið og roykt hash ella annað rúsandi, sigur vakthavandi.

Eingin ákæra verður reist móti kvinnuni.

Annars hevur vikuskiftið verið sum so mong onnur vikuskifti, sigur vakthavandi á politistøðini. Onkur er tikin fyri at koyra ov skjótt, fleiri fráboðanir hava verið um fullar bilførarar, og tveir mans, sum koyrdu út av á Oyggjavegnum, vóru seinni handtiknir við hús og ákærdir fyri rúsdrekkakoyring og at koyra uttan koyrikort.

Politiðið var tvær ferðir úti til húsaófrið. Í øðrum ferinum, var maðurin tikin til politistøðina, meðan persónurin í hinum ferinum lovaði at halda seg vekk frá húsinum, har hann hevði verið til fortreð.




*Løgreglan hevði nokk at gera um vikuskiftið*



*Anders Fogh Rasmussen var fullur í lovorðum um amerikanska forsetan, tá hann vitjaði Bush um vikuskifti*

# Fogh vitjar Bush fyri alt ríkið

**Anders Fogh Rasmussen, forsetisráðharri, vitjar í hesum døgum George Bush. Við amerikanska, danska, grønlendska og føroyska flagginum aftanfyri seg greiddi hann frá, at teir fóru at tosa um millum annað Irak, Afghanistan og Kyoto avtaluna**

UTTANRÍKISMÁL
*Dorit Hansen*
*dorit@sosialurin.fo*

Tað eru bara 16 statsleiðarar, sum hava havt høvið at vitjað George Bush á ranchuni, og hetta er fyrstu ferð at Anders Fogh Rasmussen fær heiðurin. Umframt at súkla saman á mountainbike, sum bæði Fogh og Bush dáma væl, so skulu teir báðir tosa um Irak, Afghanistan og Kyoto avtaluna.

Føroyska Løgtingið samtykti í 2003 at boða frá, at Løgtingið ikki stuðlaði krígnum í Irak, uttan so at tað varð samtykt av ST. Og Føroyar hava - eins og USA - ikki staðfest Kyoto avtaluna. Um hesi føroysku undantøk verða tikin upp á vitjanini í Texas í dag kom ikki fram hvørki á tíðindafundinum við Merkinum ella tíðindafundinum sunnudagin í Teksas.

### Høgni undrast

Nýggi føroyski landsstýrismaðurin í uttanríkismálum undrast yvir, at danski forsætisráðharrin veittrar við Merkinum í samband við Bush vitjan

- Tað er ógvuliga óvanligt, at grønslendsku og føroysku fløggini verða brúkt, tá Danmark markerar seg altjóða, sigur Høgni Hoydal.

Tí heldur hann tað vera serliga løgið, at Merkið verður brúkt á tíðindafundi um statsvitjanina hjá Bush.

- Vit hava gjørt vart við, at vit ikki taka undir við krígnum í Irak, og tá hetta er eitt høvðusevni á vitjanini, er tað ótrúliga óheppi, at Merkið verður brúkt, sigur landsstýrismaðurin í uttanríkismálum.

Landsstýrismaðurin fer annars í dag at hava sín fyrsta fund við uttanlandsnevndina, har hann fer at kunna um bæði stutttíðar og langtíðar ætlanir hjá nýggja føroyska uttanríkisráðnum.



*Skulu vit í kirkjuni vera demokratisk, so hevur landsstýrisfólkið í mentamálum rætt at vera ateistur, sigur Jógvan Fríðriksson, bispur*

bispur sjálvur hevur bíðað eftir í 22 ár.

- Skulu vit í kirkjuni vera demokratisk, so hevur landsstýrisfólki í mentamálum rætt at vera ateistur, sigur bispur.

- Tað eru nógv uttanfyri kirkjuna, sum eru góð við kirkjuna, og hyggur man eftir hvussu løgtingslóg atkvøddu seinasta summar, tá fíggjarlógin hjá kirkjuni var fyri, so vóru tað nógv holl kirkjufólk, sum vóru við til at leggja kirkjuni eitt haft um beini, staðfestur Jógvan Fríðriksson.

- Landsstýriskvinnan er ikki kirkjan, tað er kirkjuliðið. Vit skulu taka okkum av tí andaliga. Tí gevur tað mær ongar trupulleikar, at landsstýriskvinnan ikki er limur í fólkakirkjuni.